## Riggaði ikki at ringja

Tá ið Andrew vaknaði eftir skurðviðgerðina, vildi hann geva boð frá sær, men tað gekk illa við at ringja til fólk.

- Eg fekk einki samband við nakra føroyska telefon. Eg royndi við mínari telefon, og so við telefonini hjá onkrari av sjúkrasystrunum, men tað segði tað sama. Einki samband var við tey føroysku nummrini. Vinamaðurin hjá mær, Símun, býr í Keypmannahavn, og eg dugdi hansara telefonnummar í høvdinum, so eg ringdi til hansara klokkan sjey um morgunin og bað hann fáa fatur á Margareth. Hann var helst eitt sindur kløkkur, tá ið eg ringdi, sigur Andrew.



*Andrew saman við danska læknanum, sum stóð fyri skurðviðgerðinum av honum*

# Ung hjún á egg

**Hjúnini Andrew og Margareth Djurhuus fingu ein kvøkk fyri lívið, tá ið Andrew fyri trimum mánaðum fekk ein hjartatilburð. Andrew var í lívsvanda og mátti flúgvast til Danmarkar á miðjari nátt fyri at fáa eina lívbjargandi skurðviðgerð. Her siga tey frá skakandi hendingini, hvussu tey fótaðu sær á eggini til deyðan, og hvussu tað er at koma fyri seg aftur**



## Lívssøga

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Sunnudagurin 4. mars er ein dagur, sum hjúnini Andrew og Margareth Djurhuus ongantíð fara at gloyma. Hetta var dagurin, tá ið sunnudagsidyllur í Syðrugøtu broyttist til lívsvanda eftir einari lítlari løtu. Barnalátur og hugnaprát vóru avloyst av sirenum og hvítum kitlum.

Ungu hjúnini fingu ein kvøkk fyri lívið, tá ið Andrew fekk ilt fyri hjartað, og tey vórðu send til Danmarkar við flogfari á miðjari nátt, fyri at hann skuldi hava nakran møguleika at yvirliva. Á eggini til deyðan upplivdu tey frið við seg sjálvi og sína støðu.

- Eg visti, hvat kundi henda, men eg var ikki bangin. Eg upplivdi ein øgiligan frið, sigur Andrew um hendingina, sum kundi spælt øðrvísi av, men sum við hjálp frá familju, vinfólki og dugnaligum fólki í heilsuverkinum endaði væl.

### Helt tað var stress

Tað eru farnir slakir tríggir mánaðir síðani dagin, tá ið lívið hjá Andrew og Margareth varð vent upp og niður.

- Vit høvdu fingið vitjan av vinfólki úr Klaksvík, og børnini spældu uttanfyri. Knappliga kendist tað, sum um eg fekk ein neva í bringuna. Eg hevði ilt við at anda, hevði pínu og fór at sveitta. Eg legði meg á sofuna eina løtu og vildi ikki gera nakað hóvasták burturúr – helt at tað fór at ganga yvir, greiðir Andrew frá.

- Eg helt, at tað kanska vóru symptomir um stress, men vinfólkini vildu hava, at eg fór til